# *Føroyingar í russiskum bókmentum*

*G. I. Anokhin*

Í russiskum bókmentum undan kollveltingini og í sovjetskum vísindum fram til 1960-árini hevur fáur gáað um søguligar og etnografiskar spurningar hjá føroyingum. Undan 1917, eftir tað at stutt grein »Zabỳtyj ugolòk« (Gloymdur krókur) eftir fyrsta skrivandi russan, ið hevði verið í Føroyum og hevði sagt frá tí, sum hann sá, og greinin »Farèrskie ostrovà« (Føroyar) var komin at standa í »Entsiklopedíčeskij slovàr«, Brockhaus og J. A. Efròn,[1] (alfrøðibók), varð útgivin lítil eyðskild bók eftir annan russan, ið verið hevði í Føroyum, har hann sigur frá tí, ið hann hevði rakt við viðvíkjandi gerandislívinum hjá fólki í Føroyum.[2]

Fyrsta smágrein um føroyingar í sovjetskari søgufrøðiligari skriving er eftir Viljam Pokhljòbkin. Greinin er vísindalig tíðindagrein og stóð prentað í einum víða kendum unglingatíðarriti. Høvundurin var ongantíð í Føroyum og hevur nýtt tilfar úr útlendskum bløðum til sítt djarvliga skrivaða yvirlit yvir samfelagsligu støðu føroyinga fyrstu tíðina eftir kríggið.[3]

Nú eina triðingsøld hevur undirritaði skandinavisturin Gènrikh Anòkhin (seinni í hesi grein: G. A.) skrivað um søgu og etnografi føroyinga sum eitt av høvuðsverkevnum sínum sum serfrøðingur. Men í áratíggju hevur verið havdur tann siður í Sovjetsamveldinum at avmarka loyvið at fara burtur í lond hjá teimum, sum eftir ætli landsstjórnarinnar, bolsjevikkafloksins og Vísindaakademis Sovjetsamveldisins fáast við »óaktuell vísindi«, serliga um so hevur verið, at vísindamaðurin hevur ikki verið kommunistur – tað er, undir treytum einræðis í 70 ár í Sovjetsamveldinum: floksleysur. Hetta var atvoldin til, at ikki hevur eydnast G. A. at vitja í Føroyum fyrr enn í 1988 í ein mánað (eftir persónliga innbjóðing). Og júst av hesum sama eru 26 av teim 32 avrikum hansara um føroyingar skrivað undan hesi ferð og við støði einans á útlendskum – serstakliga skandinaviskum og fyrst av øllum føroyskum – vísindaligum heimildarbókmentum.

Fyrsta greinin hjá G. A. um gerandislív føroyinga kom út í 1962 í populer-vísindaligum alsovjetskum ársriti.[4] Sama ár varð grein hansara um list og byggilist føroyinga prentað í 4 binda verki, sum »Sovètskaja Entsiklopèdija«[5] gav út. Í størsta sovjetska etnografiska tíðarritinum hevði hann

drúgva grein um søgu og forna dagliga yrki føroyinga,[6] og í mest lisna vikublaðnum í 60-árunum essay um grindadráp, fuglaveiði og ræning sum vinnu føroyinga frá gamlari tíð.[7] Onnur grein, um sethús og úthús føroyinga, stóð í frammanundan nevnda etnografiska tíðarriti.[8] Í tí autoritativa ársritinum hjá skandinavistunum, sum út verður givið í Estlandi, gjørdi hann grein á uppruna og etnisku søgu teirra, ið búgva í Føroyum. Heimildirnar vóru upplýsingar úr etniskari navnagransking og antropologi.[9]

Miðskeiðis í 60-árunum gav Etnografiski stovnur Vísindaakademis Sovjetsamveldisins út verk á vísindaligum støði í 18 bindum, »Naròdy mìra« (Fólkini í heiminum). Í 2. bindi, »Naròdy Zarubèžnoj Evròpy« (Fólkini í Evropa handan mark (Sovjetsamveldisins)), stóð søgufrøðiligt etnografiskt kapittul, »Farèrtsy« (Føroyingar), eftir G. A. Hetta er monografisk heildarviðgerð.[10]

Í tesunum hjá G. A. um evnið »Obščìnnye tradìtsii Farèrskogo krestjànstva« (Felagsskaparsiðir hjá føroyskum bóndum), sum eru til skjals í tilfarssavni til »2. vísindaligu ráðstevnu um søgu, búskap, mál og bókmentir Skandinavisku landanna og Finnlands«, eins og í sjálvum fyrilestrinum um hetta evni[12] við heimildum um danskan og føroyskan rætt sum støði, eru kannað búskaparligu viðurskiftini í patriarkalum grannafamiljum í miðøld og kjarnafamiljum í nýggjari tíð um somu leiðir, sum eru uppkomin av felagsnýtslu av jørð til seyðahald. Í 5 binda verkinum »Očerki obščej etnogràfii« (Greinir um almenna etnografi) í bindinum »Zarubèžnaja Evròpa« (Evropa handan mark) er greinin »Føroyingar« eftir G. A. Her verður landnámið umrøtt, yrki landnámsmanna: seyðahald, kópaveiði, fuglaveiði og ræning; uppkoma tilvitsku føroyinga um seg sum tjóð; útróður og seinni langfarafiskiskapur; uppkoma og framvøkstur bókmenta í Føroyum.[13]

Í 1966 gav G. A. út fyrstu bókina um føroyingar. Hon er einasta bók útgivin í Sovjetsamveldinum um hetta fólk. Svart-ar-hvítar myndir eru í bókini; tær eru allar endurprentaðar úr føroyskum og øðrum skandinaviskum bókmentum. Myndirnar eru ætlaðar at geva hóma av gerandislívi og bygd og býi.[14] Tesurnar »K vopròsu o natsionàlnom dvižènii Farèrtsev« (Til spurningin um tjóðskaparrørsluna hjá føroyingum) eru útgivnar í sambandi við »3. vísindaligu ráðstevnuna um søgu, búskap, mál og bókmentir Skandinavisku landanna og Finnlands« í stuttum yvirliti.[15] Eftirfylgjandi drúgvu vísindaligu kanningarnar á somu leið – »K istòrii borbỳ za natsionàlnoe samoopredelènie na Farèrskikh ostrovàkh« (Til søgu stríðsins fyri tjóðskaparligari sjálvavgerð í Føroyum) prentaðar í einum av høvuðstíðarritunum um søgufrøðiligar spurningar[16] og »K problèmam formirovània Farèrskogo naròda i vozniknovènia na Farèrakh natsionàlno-osvobodìtelnogo dvižènija« (Til spurningarnar, hvussu føroyska tjóðin myndaðist, og hvussu tjóðskaparliga frælsisrørslan kom í í Føroyum)[17] siga frá teinum á leiðini fram ímóti mentanarligari endurføðing, frá politiska flokkabýtinum frá 1906 og seinni, sosiala og búskaparliga framvøkstri samfelagsins, sum í 1948 fekk heimastýri í danska ríkinum.

G. A. hevur í drúgvari ritgerð kannað málsøgu tjóðarheitisins »føroyingar«. Henda ritgerð er prentað í vísindaritinum

hjá sovjetskum navnafrøðingum.[18] Í alfrøðibókaútgávu 1973[19] og 1977[20] skrivaði hann greinirnar «Føroyingar«. Í 20 binda verkinum »Stràny í naròdy« (Lond og tjóðir), (sum fekk virðisløn frá sovjetska státinum), eigur G. A. í bindinum »Sèvernaja Evròpa« (Norðurevropa) greinina »Farèrskie ostrovà« (Føroyar), sum nemur við nógv ymiss viðurskifti – søgu, búskap, etnografi.[21] Fólksliga og samfelagsliga andlit føroysku tjóðarinnar nú á døgum verður greint í sergrein í vísindaligum savnsverki, ið út verður givið í Estlandi.[22]

Í tesunum »Brak í fòrmy egò zaključènija u Farèrtsev« (Hjúnalag og gifting hjá føroyingum) útgivnum í sambandi við »X. alsovjetsku ráðstevnuna um søgufrøðiliga gransking, búskapargransking, bókmentagransking og málgransking skandinavisku landanna og Finnlands«[23] kannar G. A. hetta evni, sum hann eisini tekur til eftirkanningar í sergreinum: í sjálvstøðuligum kapitli í tríggja binda verkinum hjá etnografiska stovni Vísindaakademis Sovjetsamveldisins[24] og í árbók í Estlandi[25]; í hesi árbók hevur hann greint viðurskiftini í grannafelagsskapinum og í familjuni sínámillum og siðir undan brúdleypi og brúdleypsfyrireikingar frá miðøld til byrjan seinna heimsbardaga.

Í lærubók fyri universitetini í Sovjetsamveldinum, »Etnogràfija«, í undirkapitlinum »Naròdy Zàpadnoj Evròpy« (Fólkini í Vesturevropa) hevur G. A. eisini sagt frá summum eyðkennum føroyinga.[26] Samfelagslig og búskaparlig, søgulig og etnografisk eykenni eru umrødd í greinunum »Føroyingar« – í einum av mætastu sovjetsku søgufrøðiligu tíðarritunum[27] og í alfrøðiligari handbók.[28]

Í 1991 kemur kollektiva monografiin »Istòrija Dànii« (Søga Danmarkar), ið er tann fyrsta um hetta evnið, ið sovjetskir søgufrøðingar hava avrikað. Í hesum verki er G. A. høvundur at kapitlinum »Istòrija Farèrskikh ostrovòv« (Søga Føroya) – frá fyrstu skrivaðu heimildunum 825 e.o.t. til okkara dagar.

Eftir føroyaferðina í 1988 og til februar 1991 hevur G. A. greitt til prentingar 6 greinir um føroyingar: »Privèt s Farèrskikh ostrovòv« (Heilsan úr Føroyum)[29], »Stranà vosemnàdtsati ostrovòv« (Átjan oyggja landið)[30], »Etnosotsiàlnyj òblik farèrtsev« /po polevỳm nabljudènijam 1988 gòda (Fólksligu og samfelagsligu eyðkenni føroyinga/ eftir tí, sum høvundurin sjálvur hevur rakt við í 1988)[31], »Pokorjù li ja Enniberg?« (Man eg fara at leggja Enniberg undir meg?)[32], »Domàšnie istòrii Farèrskikh ostrovòv« (Gestur inni hjá føroyingum (soleiðis týðir G. A. sjálvur henda titul))[33] og »Poèzdka na Farèrskie ostrovà« (Ferð til Føroya).[34]

Í 1960-árunum læt blaðmaðurin Maràt Zùbko prenta ferðafrásøgnina »Na stỳke dvukh okeànov« (Á markinum ímillum tvey høv).[35] Í 1980-árunum skrivaðu aðrir blaðmenn hesum líkar greinastubbar: Ju. Koroljòv »Sỳny bespokòjnogo mòrja« (Synir hins óslætta havs),[36] M. Kòstikov »Na okràine Atlàntiki« (Á jaðri Atlantshavs).[37] Hesir tríggir tíðindamenn hjá sovjetskum høvuðsbløðum hava sjálvir dvalst í Føroyum. Burtur úr tí tilfari, ið hann sjálvur fekk til vegar á føroyaferð síni í 1988, úr upplýsingum úr vísindaligum heimildum, úr bókmentum og fjølmiðlum fæst undirritaði nú við at skriva bókaverk um Føroyar. Ætlanin er, at bókin skal vera væl útgjørd við hansara egnu myndum, svørtum-hvítum og litmyndum. »Na ost-

rovàkh vodopàdov« (Á fossaoyggjunum) skal bókin eita.

**Tilvísingar:**


1. »Vokrùg svèta«, Moskva, 1886; »Entsiklopedìčeskij slovàr«, bd. XXXV, Sankt-Peterburg, 1902.
2. Rossìev P. »Farèrskie ostrovà«. Moskva, 1907.
3. Pokhljòbkin V. V.: »Farèrskie ostrovà«, »Vokrùg svèta« No. 4, Moskva, 1952.
4. »Zemljà i ljùdi«, Moskva, útg. »Mysl«, 1962.
5. »Iskùsstvo stran i naròdov mìra«, bd. I, Moskva, 1962.
6. »Sovètskaja etnogràfija«, No. 3, Moskva, 1963.
7. »Nedèlja« No. 47, Moskva, 17.-23. nov. 1963.
8. »Sovètskaja etnogràfija« No. 6, Moskva, 1964.
9. »Skandinàvskij sbòrnik«, X. útgáva, Tallinn, útgevari Universitetið í Tartu, 1965.
10. »Naròdy Zarubèžnoj Evròpy«, bd. 2, Moskva, útgevari »Naùka«, 1965.
11. »Tèzisy doklàdov 2-j naùčnoj konferèntsii po istorii, ekonòmike, jazykù i literatùre skandinàvskikh stran i Finljàndii«, Moskva, 1965.
12. »Skandinàvskij sbòrnik«, XII. útg., Tallinn, Universitetið í Tartu gav út, 1967.
13. »Očerki òbščej etnogràfii. Zarubèžnaja Evròpa«, Moskva, 1966.
14. Genrikh Anokhin: »Na ostrovàkh doždèj«. Moskva, útgevari »Mysl«, 1966.
15. »Tèzisy doklàdov 3-j naùčnoj konferèntsii po istòrii, ekonòmike, jazykù i literatùre skandinàvskikh stran i Finljàndii«, Moskva, 1966.
16. »Nòvaja i novèjšaja istòrija«, No. 3, Moskva, 1968.
17. Vísindaliga savnsverkið »Etnìčeskie protsèssy v Zarubèžnoj Evròpe«, Moskva, útgevari »Naùka«, 1970.
18. »Etnonìmy«, Moskva, útgevari »Naùka«, 1969.
19. »Sovètskaja istorìčeskaja entsiklopèdija«, bd. 14, Moskva, útgevari »Sovètskaja entsiklopèdija«, 1973.
20. »Bolšàja sovètskaja entsiklopèdija«, bd. 17, Moskva, útgevari »Sovètskaja entsiklopèdija«, 1977.
21. »Sèvernaja Evròpa« í røðini »Stràny i naròdy«, Moskva, útgevari »Mysl«, 1982.
22. »Skandinàvskij sbòrnik«, XXX. útgáva, Tallinn, Universitetið í Tartu gav út, 1985.
23. »Tèzisy doklàdov X-j vsesojùznoj konferèntsii po izučeniju istorii, ekonòmiki, literatùry i jazykà skandinàvskikh stran i Finljàndii«, 1. deild, Moskva, 1986.
24. »Brak u naròdov Sèvernoj i Sèvero-Zàpadnoj Evròpy«, Moskva, útg. »Naùka«, 1990.
25. »Skandinàvskij sbòrnik«, XXXII. útg. Tallinn, Universitetið í Tartu gav út, 1988.
26. »Etnogràfija«, Moskva, útgevari »Vỳsšaja škola«, 1982.
27. »Vopròsy istòrii« No. 5, Moskva, 1987.
28. »Naròdy mìra«, Moskva, útg. »Sovètskaja entsiklopèdija«, 1988.
29. Dagblaðið »Priazòvskie stepì«, Ejsk, 24. september 1988.
30. »Sotsialistìčeskaja indùstrija«, Moskva, blað hjá aðalnevnd kommunistiska floks Sovjetsamveldisins, 20. august 1989.
31. »XI-aja vsesojùznaja konferèntsija po izučeniju istòrii, ekonòmiki, literatùry i jazykà skandinàvskikh stran i Finljàndii«, Moskva, 1989.
32. »Industriàlnoe Zaporòžje«, Zaporòžje, 29. nov., 1. og 2. des. 1989.
33. »Vokrùg svèta« No. 5, Moskva, útg. »Molodàja Gvardija«, 1990.
34. »Naùka i žizn«, No. 11 og 12, Moskva, útg. »Pràvda«, 1990.
35. »Izvèstija«, Moskva, 22. oktober 1967.
36. »Vokrùg svèta« No. 8, Moskva, útg. »Molodàja Gvàrdija«, 1982.
37. »Pràvda«, Moskva, 11. mai 1987.